gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Elttør roknar við BP borar í ár

Her eru tvær gerinar á sama dokumenti - til tí fyrru mynd av bori og eltør (hann er í arkivi) og til tí seinnu mynd av skuipoum sum taka olju

OLJULEITING
*Jan Müller*

-Vit hava eingi boð fingið frá BP um, at teir ikki fara at bora. Tvørturímóti legði stjórin hjá BP stóran dent á, at teir kundu byrja at bora í ár, tá skrivstovan varð latin upp í fjør. Tí rokna vit sjálvandi við, at BP borar í ár.

Hetta sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, nú tíðindi hava gingið um, at BP møguliga fór at útseta sína boring til í næsta ár. Tað var føroyski stjórin hjá BP, Hjarnar Djurhuus, sum í samrøðu við Sosialin herfyri segði, at boripallurin Jack Bates, sum skuldi brúkast til Føroyaøkið, helst fór at taka sær av øðrum uppgávum hinumegin markið.

Sosialurin skilur, at BP hevur havt fyrispurning um boriskipið West Navion. Og at tað verður leitað eftir einum boripalli eisini.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður roknar við, at BP fer at bora í ár.*



*BP hevur fyrr boðað frá, at tað fór møguliga at bora tveir brunnar í ár.*

# Hetlendingar ovurstóran áhuga fyri Føroyum

SAMVINNA
*Jan Müller*

Nógv bendir á, at samvinnan millum Føroyar og Hetland bara fer at vaksa. Hetlendingar gjørdu í gjár endaliga av at seta 50 mill. kr. í nýggju Norrønu og sama dag samtykti bretska stjórnin at lata part av fíggingini til út- og umbyggingingi av havnaterminalinum í Lervick. –Hetta er spennandi tíðir fyri okkum í Hetlandi, nú skjøtil verður sett á at um- og útbyggja havnina sigur eitt umboð fyri Shetland Islands Council, sum Sosialurin tosaði við í gjár. Umboðið helt tað vera stórhending fyri Hetland, at ikki færri enn tríggjar nýggjar ferjur fara at sigla millum Hetland og Skotland og Føroyar frá 2003. –Tað ganga vanliga meira enn 25 ár at vit fáa eina nýggja ferju. Nú fáa vit tríggjar í sama ári leggur hann aftrat.

Tað er greitt, at hetlendingar síggja stórar møguleikar í eini øktari samvinnu við Føroyar og nú um dagarnar var aðalstjórin í Shetland Islands Council í Føroyum, har hann hevði fundir við umboð fyri vinnulív og myndugleikar m.a. løgmann og oljumálaráðharran.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at teir hava fingið eina innbjóðing at koma til Hetlands at siggja umstøðurnar har, eitt nú risastóra oljuterminalin í Sullom Voe.

Eyðun Elttør vitjaði annars í Orknoyggjum nakað herfyri, har hann m.a. sá stóra oljuterminalin har, Flotta. Tað eru hesir báðir terminalarnir , sum í dag taka ímóti oljuni frá Atlantsmótinum, tvs. teimum báðum keldunum Foinaven og Schiehallion skamt frá føroyska markinum. Tað er eingin loyna, at eitt nú hetlendingar fegnir síggja, at møgulig føroysk olja verður flutt til teirra oljuhavn, um so er at føroyingar gera av, at eingin olja skal í land í Føroyum.

Sum Sosialurin skilur, so er møguleiki fyri, at umboð fyri løgtingið t.d. løgtingsins vinnunevnd fara at vitja í Hetlandi í næstum.



*Sullom Voe, oljuterminalurin í Hetlandi, sum nú verður útbygdur. Hetlendingar síggja fegnir, at føroyingar fara at brúka hann*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



*Politisk semja er um, at flyta umsiting út í útjaðaran. Hetta sýndi orðaskiftið í VB-húsinum mánakvøldið um økismenning heilt greitt. Serliga vóru tað Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard, sum hvør í sær komu við ítøkiligum uppskotum, sum teir vóru ógvuliga samdir um*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Almennir stovnar skulu í útjaðaran

**Allir flokkar á tingi eru samdir um, at almenn umsiting í størri mun eigur at verða løgd í útjaðaranum.**

ØKISMENNING
*John Johannessen*

Almenn umsiting eigur at verða flutt út í útjaðaran.

Hesum vóru umboðini fyri allar politisku flokkarnar samd um undir orðaskiftinum um økismenningarálitið í VB-húsinum í Vági mánakvøldið.

Jóannes Eidesgaard (C), Høgni Hoydal (E) og Helena Dam á Neystabø (D) vóru øll samd um, at politiski myndugleikin beinleiðis eigur at fara inn og gera av, at umsiting í so stóran mun sum gjørligt eigur at verða løgd í útjaðaranum.

## Venda próvbyrðuni

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, hevði eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu hetta kann gerast. Hann mælti til, at próvbyrðan fyri, hvar almennir stovnar skulu leggjast verður vend á høvdið.

Hetta merkir, at útgangsstøðið er, at ein almennur stovnur, sum skal setast á stovn, skal liggja í útjaðaranum, og at ógvuliga tungt vigandi grundgevingar skulu til, um hann kortini skal leggjast í miðstaðarøkinum. Í dag er tað soleiðis, at gingið verður út frá, at nýggir almennir stovnar skulu leggjast í Havn, men at teir møguliga kunnu leggjast aðrastaðni, um grundgivið verður nóg væl fyri hesum.

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, tók av fullum huga undir við uppskotinum hjá Høgna Hoydal. Men Jóannes Eidesgaard helt kortini, at uppskotið mátti byggjast eitt sindur út, so tað eisini fevndi um at flyta núverandi almenn stovnar út í útjaðaran. Tað er nevniliga eftir hansara sannføring ikki nóg mikið at flyta nýggjar almennar stovnar út í útjaðaran.

Hesum tók Høgni Hoydal undir við.

Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, var samd. Men hon helt tað kortini ikki vera rætt, bert at hugsa um størv í almennum stovnum. Hon vísti á, at høg størv innan onnur áhugaverd øki enn almenna fyrisiting mugu finnast í útjaðaranum.

Formaður Sambandsfloksins, Lisbeth L. Petersen, undraðist yvir tosið hjá Høgna Hoydal, um at flyta nýggjar almennar stovnar til útjaðaran.

– Fullveldislandið Føroyar skal jú rationaliserast. Og rationalisering hongur ikki saman við desentralisering, gjørdi Lisbeth L. Petersen greitt.

## Aðalstýrini í Havn

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, reisti í hesum sambandi spurningin, um tað ber til at skrykkja aðalstýri upp við rót og flyta tey í útjaðaran.

Hetta helt eingin av politisku umboðunum vera nakað gott hugskot.

Aðalstýrini mugu vera í Havn. Men aðrir stovnar kunnu flytast, var svarið frá innbodnu gestunum.

Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal vístu báðir á, at ein skipa ætlan skal til fyri at flyta stovnarnar. Tí annars verður bara, sum vanligt, stríð millum ymsu økini um almennu stovnarnar, og so enda teir aftur í Havn fyri at varðveita friðin.

# Eiga at umhugsa nýval

**Forkvinna Sjálvstýrisfloksins heldur, at samgongan nú eigur at hugsa um møguleikan at skriva út nýval**

SAMGONGU-ÓSEMJA
*John Johannessen*

Løgmaður eigur at umhugsa, um føroyski veljarin skal sparast fyri einum valári.

Hetta heldur Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, sum er við í samgonguni.

Helena Dam á Neystabø heldur, at stríðið ímillum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin er vorðið til eina landaskomm.

– Teir báðir stóru samgonguflokkarnir eru farnir at bera seg at sum smábørn. Tað ber ikki til at koma við uppskotum og gjara út, hvør í sínum lag. Tað, sum skuldi vera skipað loysing er vorðið skipað kaos, sigur Helena Dam á Neystabø.

Forkvinna Sjálvstýrisfloksins vísir á, at samgongan má vera samd og ikki alla tíðina royna at yvirbjóða hvørja aðra. Í hesum sambandi sipar hon til ósemjuna um bensinavgjaldið, Suðuroyarskipið, og nýggju semjuna millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og Starvsmannafelagið.

– Tað hevur stóran týdning, at vit halda fram í samgonguni og fáa uppskotini um sjálvstýri Føroya fólks og búskapargrunnin samtykt. Men heldur hetta ósklið fram, eiga vit at umhugsa, hvat er best fyri veljaran, sigur Helena Dam á Neystabø, forkvinna fyri eina av teimum trimum samgonguflokkunum.

# Hergeir spyr um flogsamband

FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Hvat hevur landsstýrismaðurin gjørt fyri at kanna loftvegis sambandið við Suðuroynna, og nær fer hann at leggja úrslit fyri løgtingið?

Soleiðis ljóðar skrivligi fyrispurningurin, ið Hergeir Nielsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, hevur sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, um loftvegis sambandið við Suðuroynna.

Hergeir Nielsen vísir í viðmerkingum sínum á, at tað stendur í samgonguskjalinum, at møguleikin fyri loftvegis sambandi skal kannast. Tí vil hann hava at vita, hvussu langt landsstýrismaðurin er komin við hesum máli.

Hergeir Nielsen hevur áður verið heitur forsprákari fyri loftvegis sambandi millum Suðuroynna og miðstaðarøkið. Hann hevur millum annað mælt til, at sambandið verður røkt av smáum vatnflogførum, ið kunnu lenda á ávíkavist Trongisvágsfirði og Havnarvág.

# Fjarskiftið má tryggjast

**Samstundis sum Føroya Tele boðar frá, at tað hevur trupulleikar við at veita øllum borgarum somu tænastur, staðfestir økismenningarálitið, at góðir fjarskiftismøguleikar er ein avgerandi fyritreyt fyri menning**

ØKISMENNING
*John Johannessen*

Vandi er fyri, at Føroya Tele orsakað av kapping ikki fer at megna at veita útjaðaraøkjunum somu tænastur, sum miðstaðarøkinum.

Hesum boðaði Andras Róin, stóri fyri Føroya Tele, frá í formansfrágreiðingini frá ársaðalfundinum hjá Føroya Tele fáar dagar áðrenn økismenningarálitið varð handað landsstýrismanninum í mentamálum í VB-húsinum í Vági.

Í økismenningarálitinum verða fjarskiftistænastur nevndar, sum ein týðandi táttur í menningini av útjaðaranum. Økismenningarálitið metir gott fjarskiftissamband vera eina ta mest avgerandi fyritreytina fyri framburði.

Men økismenningarálitið sær eisini vandan í, at Føroya Tele fær alsamt størri kapping. Økismenningarbólkurin hevur tosað við umboð fyri Føroya Tele, sum siga, at økta kappingin væntandi fer at bera í sær, at minni orka fer at verða nýtt til útjaðaran.

## Oljufeløgini hjálpa

Sosialurin tók upp trupulleikan við veitingarskyldurni hjá Føroya Tele undir orðaskiftinum í VB-húsinum um økismenningarálitið.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, vísti á, at útlendsk oljufeløg helst kunnu tryggja samskiftið við at leggja kaðalar ella stuðla Føroya Tele fíggjarliga. Men Høgni Hoydal var eisin opin fyri, at bygt verður út við almennum stuðuli. Tó gjørdi hann púra greitt, at Føroya Tele framvegis skal rekast við vinnuligum grundarlag og at kapping skal vera á fjarskiftisøkinum.

Jóannes Eidesgaard helt tað vera heilt burturvið av Høgna Hoydal at tosa um, at oljufeløg skulu tryggja veitingarskylduna. Hann helt bestu loysnina vera, at tað almenna útbyggir og eigur linjurnar og netið, og so kunnu Føroya Tele og onnur feløg veita tænastur gjøgnum hetta kerv. Hetta helt Jóannes Eidesgaard vera bestu loysnina at tryggja útjaðaranum somu møguleikar, sum miðstaðarøkinum innan fjarskifti.

## Ongan stuðul

Lisbeth L. Petersen, formaður Sambandsfloksins, var samd við hinum í, at veitingarskyldan skal tryggjast. Men hon helt kortini ikki, at Føroya Tele skal hava almennar pengar. Somu fatan hevði Jóannes Nielsen úr Fólkaflokkinum.

Helena Dam á Neystabø úr Sjálvstýrisflokkinum helt tað eisini vera náttúrligt at tryggja veitingarskylduna, men hon hevði einki boð uppá, hvussu hetta skuldi gerast.

Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur, sum hevur verið við til at gera økismenningarálitið vísti í hesum sambandi á, at politikarar mugu gera upp við seg sjálvar, um Føroya Tele skal vera til fyri at hava vinning, ella tað skal vera eitt felag, ið tryggjar samskiftið í landinum.

Hesum var Jóannes Eidesgaard samdur við honum í.

– Tað er løgi at hugsa sær, at føroyski landsstýrismaðurin í vinnumálum, skal vera millumgongumaður millum ísraelsmenn og palestinar innan fjarskifti, samstundis sum tað ikki ber til at tosa í GSM í Fámjin, segði Jóannes Eidesgaard.

# Umugsa at banna tubbakki

Miðflokkurin umhugsar at leggja fram uppskot komandi tingsetu um at gera tað ólóligt at innflyta tubbakk til Føroya.

Á landsfundi Miðfloksins seinasta leygardag nevndi ein av limum floksins hetta hugskot.

Fundurin gjørdi av, at hugsast skal víðar um hetta uppskot.